# Nú er nýggi Smyril farin at líkjast



*Her fæst ein betri fatan av skipinum higartil. Tað sæst, at hann er rankur framman fyri at vera so sjógóður sum gjørligt og hann breiðkar aftur eftir.Tað sæst inn á biladekkið*

**Nú er nýggi Smyril farin at taka skap og Strandferðslan er heilt væl nøgd við handverkið**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Nú er nýggi Smyril farin at líkjast einum skipi. Fleiri partar av skipinum eru nú settir saman, so at nú fæst ein mynd av, hvussu hann fer at síggja út, tá ið hann er liðugur.

Og Magnus Magnussen á Strandferðsluni sigur, at teir eru sera væl nøgdir við handverkið.

– Hendan skipasmiðjan stendur onki aftanfyri tær, vit kenna úr Norðurlondum, sigur hann.

Hann sigur eisini, at higartil hevur byggingin gingið sum ætlað og tað er onki sum bendir á, at Smyril ikki verður liðugur til tíðina:

Sostatt er málið enn, at hann skal handast Strandferðsluni 12. oktober næsta ár.
Samstundis má ásannast, at tað gongur skjótt at byggja skip nú á døgum.

Tað fjórða november í fjør, at fyrsta stálið varð skotið og 19 mars í ár var kjølurin strektur.

Og tá er byggitíðin enntá long eftir nútíðar metum, men arbeiðstíðin, sum er avtalað ímillum skipasmiðjuna og Strandferðsluna, verður hildin.

Fyri at hava betri eftirlit við byggingini, fer Magnus Magnussen nú sjálvur við øllum húskinum til Spania at búgva í eitt ár, har hann skal arbeiða við nýggja Smyrli burturav.

Hann fer við Norrønu 1. august og eftir at hava hildið frí í Danmark í eina viku, koyra tey til Spania.

– Endamálið við flytingini er at hava so gott eftirlit við byggingini sum gjørligt og at tryggja, at Strandferðslan fær tað, hon hevur biðið um.

Tað er ikki tað sama at samskifta ígjøgnum luftina og at vera á sjálvum staðnum og tí flytir hann, sigur hann

### 135 metrar langur

Fyri at taka afturíaftur, kann nevnast, at nýggja suðuroyarferjan kostar 40.450.000 evrur, ella beint omanfyri 300 milliónir í okkara peningi.

Men harafturat koma so útreiðslur til kurstrygging og byggieftirlit og tilsamans hevur Løgtingið játtað 310 milliónir til skipið.

Ferjan verður goldin í trimum gjøldum, sum eru áleið líka stór.

Nýggja suðuroyarskipið verður 135 metrar langt, tað siglur 21 míl, hevur pláss fyri 800 ferðafólkum og tekur 200 bilar og tað er tvær ferðir so nógv, sum Smyril.

Tað er spanska skipasmiðjusamtakið, IZAR, sum byggir nýggja suðuroyarskipið.

IZAR samtakið hevur bygt skip í heili 250 ár. Tað er tað næststørsta skipasmiðjusamtakið í Evropa, og tað níggjunda størsta í heiminum og nýggja suðuroyarskipið verður bygt á eini skipasmiðju hjá samtakinum í San Fernando í Suðurspania.

Allar myndirnar á hesum báðum síðunum eru av nýggja suðuroyarskipinum og vit lata tær tala fyri seg.



*Her sæst aftur inn á síðuna eitt sindur frá. Tað sæst beint inn á biladekkið. Tvær plátur standa mitt fyri, men tær eru bara settar upp fyri at verja fyri sólini*



*Her sæst inn í sjálvan Smyril. Kassarnir úti í hvørjari síðu, eru kassarnir til stabilisatorararnar. Teir koma heilt úr Japan og eru nú sveisaðir í nýggja Smyril. Beint omanfyri kassarnar sæst inn á biladekkið. Allar ovast er eitt tak*



*Her sæst inn á síðuna á nýggja Smyrli. Tað fæst ein hóming av, hvussu stórur hann er*



*Her er ein nærmynd av einari sektión. Strandferðslan er væl nøgd við handverkið og tað stendur einki aftanfyri tað, vit eru von við í Norðurlondum, sigur Magnus Magnussen*



*Hesin parturin skal so sveisast upp á gronina, sum sæst á hinari myndini. Tað sæst, at pláss er gjørt fyri tveimum bógskrúvum. Tað sæst framvegis, at gronin er long og ronk*



*Her stendur ein av teimum fýra høvuðsmotorunum. Hvør teirra er upp 3,400 kilowatt*



*Her sæst inn á sjálva gronina á nýggja Smyrli. Framman er hann rankur fyri at hann skal skera seg betri ígjøgnum sjógvin. Uppá hendan partin skal so parturin við bógskrúvunum sveisast*



# Nelson Mandela boðin til Føroya

**Í sambandi við 85 ára føðingardagin hjá Nelson Mandela, hevur Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, boðið hon til Føroya á vitjan**

FØÐINGARDAGUR
*Eirikur Lindenskov*

Í dag fyllir Nelson Mandela, fyrrverandi leiðari í ANC og seinni forseti í Suðurafrika, 85 ár. Nelson Mandela var ímyndin av frælsisstríðnum hjá ANC undir hvíta minnilutastýrinum hjá Peter Bota, sum ráddi fyri borgum í Suðurafrika stóran part av árunum, Nelson Mandela sat í fangatippi.

Nógv hevur verið sagt og skrivað um Nelson Mandela ø.ll tey næstan 30 árini, hann sat í fongsli, og hevur Sosialurin gjøgnum árini eisini lagt nógv teigapláss til kjakið um tað órættvísi, ið valdaði, tá hvíta minnilutastjórnin í Suðurafrika kúgaði litta fólkið í landinum.

Í sambandi við føðingardagin hevur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialnum sent honum eina heilsan saman við eini innbjóðing um at koma til Føroya á vitjan.

Brævið er soljoðandi:

» Kæri Nelson Mandela

Við hesum brævi vil eg ynskja hjartaliga tillukku á tínum 85 ára degi tann 18 juli.

Hesi føðingardagsynski koma ikki bara frá mær, men eru eisini send vegna lesarar hjá Sosialinum, einum tíðindablað í Føroyum, har undirritaði er ábyrgdarblaðstjóri. Í alheimshøpi eru Føroyar ein lítil tjóð, og fjølmiðlarnir harvið lítlir. Tó eri eg errin av at kunna siga, at Sosialurin var eins íðin sum nakað annað blað í heiminum at grundgeva fyri, at tú skuldi latast leysur úr fangilsi og at fasthalda átøkunum móti apartheidstýrinum. Vit høvdu eina rúgvu av útgávum við tær á forsíðuni saman við stríðsfeløgum tínum, Walter Sisulu sála og Oliver Tambo sála (sum eg eisini hevði tann heiður einaferð at hitta í Stockholm).

Tað er við hesum í huga, at stóri 85 ára føðingardagur tín í einum frælsum og demokratiskum Suðurafrika er orsøk til veruligt hátíðarhald fyri okkum. Hóast vit ikki persónliga fáa verið á kongressentrinum í Sandton til føðingardagsbankettina, so eru vit har í tonkunum og vilja vissuliga lyfta okkara gløs í einari skál fyri tær fríggjadagin, óansæð hvar vit eru.

Sum føðingardagsgávu viðleggi eg hesa bók um heimland okkara. Á síðu 5 sært tú, at tú var partur av at stuðla undir hesari útgávu. Eg má ávara teg, at eg havi eina aðra grund til at senda tær hesa bók. Mín vón er, at hetta gevur tær brell at taka av eini innbjóðing, sum eg hervið gevi tær og kæru konu tíni til at vitja Føroyar. Tað eru nógv náttúruparadís í heiminum, har tú kanska longu hevur vitjað, men vit halda, at land okkara er eitt eindømi, tá tað ræður um slík. Kanska tú skilir, hví eg sigi so, eftir at hava hugt at myndum í bókini.

Eg loyvi mær at halda, at ein vitjan til Føroya hevði verið ein vælhóskandi steðgur í tíni krevjandi arbeiðsskrá. Vit liva beint við nátturuna og náttúrligu rútmun hennara, og ger hetta Føroyar til eitt vælhóskandi stað at taka tað róligt og fáa veruliga hvild. Fyri okkum vildi tað verið ein fragd og einki minni enn ein frammihjárættur at verið tínir vertir.

Vit vóna, at tær býðst høvi at taka av hesari innbjóðing áðrenn tín 95 ára føðingardag, men tú kanst verða vissur í, at hon stendur tær opin til ta tíð.

Lat meg enda við aftur at ynskja tær hjartaliga tilluku við føðingardegnum og alt tað besta framyvir.«




*Hesa snotuliga myndabókina um Føroyar fær Nelson Mandela í føðingardagsgávu frá Sosialinum – saman við eini innbjóðing um at koma til Føroya á vitjan*



Sosialurin
P O Box 76
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 314720

14 July 2003

Nelson Rolihlahla Mandela
Sandton
South Africa

Dear Nelson Mandela

With this letter I would wish to convey heartfelt congratulations on the occasion of your 85th Birthday on 18 July.

These Birthday Greetings come not only from me personally but are also being sent on behalf of the readership of Sosialurin; a newspaper published in the Faroe Islands of which I am Editor in Chief. In the global scheme of things the Faroe Islands is a tiny country and its media outlets are proportionately small operations. But I can say with some pride that Sosialurin was as active as any newspaper in the world in campaigning for your release and for sanctions to be upheld against the Apartheid Regime. There were so many editions which featured your photograph on our front page alongside those of your late comrades Walter Sisulu and Oliver Tambo (who incidentally I had the privilege of meeting in Stockholm).

It is because of this background that your landmark 85th birthday in a free and democratic

*Avrit av brævinum til Nelson Mandela*

